# VIÐTØKUR

## fyri

## P/f Atlantic Airways, Faroe Islands

Samtyktar á stovnandi aðalfundi 10. nov. 1987, broyttar á eykaaðalfundi 9. des. 1992, ársaðalfundi 6. mai 1994, eykaaðalfundi 17. okt. 1995, ársaðalfundi 19. apríl 1996, ársaðalfundi 17. apríl 1998, ársaðalfundi 18. mars 2001, eykaaðalfundi 22. sept. 2006, ársaðalfundi 31. mai 2007, 3. apríl 2008, 23. apríl 2009, 25. mars 2010, 17. apríl 2012 og 11. apríl 2016.

### I. Navn felagsins, heimstaður og endamál

**§ 1**

Navn felagsins er P/f Atlantic Airways, Faroe Islands við hjánøvnunum Atlantic Airways, Atlantsflog, Atlantic Airpors Service, Atlantic Cargo, Atlantic Charter, Atlantic Helicopters, Atlantic Line, Atlantic Tours, Atlantic Travel, Air Faroe, Faroe Air, Faroe Airline, Faroe Airways og Vagar Airport Service.

Heimstaður felagsins er Sørvágur.

Endamál felagsins er at reka flogferðslu og vinnu, sum hevur samband við flogferðslu.

### II. Partabrøvini og partapeingurin

**§ 2**

Partapeningur felagsins er settur til kr. 103.500.000,00.

Partabrøvini hava nominelt virði á kr. 100,00 hvørt og multipla av hesum.

Eingi partabrøv hava framíhjárættindi.

Partabrøvini skulu vera navnapartabrøv og negotiabul.

Partaeigararnir hava ikki skyldu til at lata partabrøv síni innloysa.

Vinningsbýti verður útgoldið til partaeigarar, sum eru skrásettir í partabrævabókini, tá aðalfundurin, sum hevur samtykt vinningsbýtið, verður hildin.

## § 3

Fráboðan frá felagnum til partaeigararnar skal vera send hvørjum partaeigara skrivliga til bústaðin, sum er skrásettur í partabrævabókini ella við lýsing í almennum føroyskum lýsingarblaði.

Partabrøv kunnu mortifiserast uttan dóm eftir teimum til hvørja tíð galdandi lógarreglum fyri negotiabul partabrøv.

## III. Aðalfundur

## § 4

Ársaðalfundur verður hildin av partaeigarunum, sum hava eina atkvøðu fyri hvørjar kr. 100,00, sum teir hava í partapeningi.

Fyri at geva atkvøðurætt krevst, at partabrøvini eru skrásett í partabrævabók felagsins, áðrenn aðalfundurin verður hildin.

## § 5

Nevndin í felagnum gevur í fyrsta lagi 4 vikur og í seinasta lagi 2 vikur áðrenn aðalfundin boð um fundin við útgreinan av tíð, stað og fundarskrá. Fráboðanin skal vera skrivlig til hvønn einstakan partaeigara og skal verða send til bústaðin, sum seinast er skrásettur í partabrævabókini ella við lýsing í almennum føroyskum lýsingarblaði. Innkallingin kann verða givin til teldubrævi, og tað er ábyrgdin hjá partaeigarunum at tryggja sær, at leiðsla felagsins hevur rætta teldubústaðin um hendi.

## § 6

Ársaðalfundurin verður hildin hvørt ár, áðrenn apríl mánaður er liðugur. Á ársaðalfundinum skulu fundarevnini vera hesi:

1. Frásøgn nevndarinnar um virki felagsins í farna ári.

2. Framløga av grannskoðaðari ársfrásøgn til góðkenningar.

3. Uppskot frá nevndini um, hvussu ársavlopið sambært góðkenda roknskapinum skal verða nýtt, ella tap sambært góðkenda roknskapinum verður dekkað.

4. Val av nevndarlimum.

5. Val av grannskoðara, sum heldur fram til næsta ársaðalfund.

6. Uppskot frá nevnd ella partaeigarum, um nakað er.

§ 7

Partaeigarar kunnu fyri nevndini skrivliga seta fram krav um at taka upp ávíst evni til dagsskránna á vanliga aðalfundinum, um tað verður sett fram í seinasta lagi 6 vikur fyri, at aðalfundurin skal haldast. Fær nevndin kravið seinni enn 6 vikur fyri, at aðalfundurin verður hildin, ger nevndin av, um kravið er sett fram í so góðari tíð, at evnið kann verða sett á dagsskránna.

§ 8

Eykaaðalfundur verður hildin, um nevndin, grannskoðarin ella aðalfundurin krevur tað, ella tá partaeigarar, sum tilsamans eiga 5% av partapeninginum, skrivliga krevja eykaaðalfund hildnan til viðgerðar av einum ávísum evni, sum samstundis verður tilskilað.

§ 9

Í seinasta lagi 3 vikur áðrenn hvønn aðalfund, skulu fundarskráin og øll uppskot til fundin vera til taks hjá partaeigarunum til gjøgnumlestur á skrivstovu felagsins. Áðrenn ársaðalfundin skal ársroknskapurin harumframt vera til taks til gjøgnumlestur.

§ 10

Fjølmiðlar hava atgongd til aðalfundin.

§ 11

Aðalfundurin velur eftir uppskoti frá nevndini ein fundarstjóra.

§ 12

Allar avgerðir á aðalfundi verða tiknar við vanligum meiriluta av atkvøðum, um annað ikki er ásett í tí til eina og hvørja tíð galdandi partafelagslóg.

§ 13

Fundarfrágreiðing verður skrivað á aðalfundinum, og fundarstjórin undirskrivar fundarfrágreiðingina.

§ 14

Fundarstjórin ger av allar spurningar viðvíkjandi atkvøðugreiðslu, men einhvør partaeigari til staðar á aðalfundinum, sum hevur atkvøðurætt, kann krevja skrivliga atkvøðugreiðslu viðvíkjandi einum ávísum evni.

## IV. Nevnd

### § 15

Í nevndina eru 4 limir valdir av aðalfundinum, Afturat hesum koma teir limir, ið lóggávan annars ásetir.

Limir nevndarinnar verða valdir fyri 1 ár í senn. Fráfarandi limir kunnu veljast aftur.

Gjørdar eru yvirskipaðar leiðreglur fyri incitamentssamsýning til nevnd og stjórn. Leiðreglurnar verða almannakunngjørdar á heimasíðu felagsins.

Nevndin skipar seg sjálv, og setur ein ella fleiri stjórar at hava dagligu leiðslu felagsins um hendi.

Um ein nevndarlimur tekur seg úr nevndini í úrtíð, kallar nevndin innan 4 vikur til eykaaðalfundar til val av nýggjum nevndarlimi fyri restina av valtíðarskeiðinum. Nevndin kann tó, um nevndin er viðtøkufør, hóast viðkomandi hevur tikið seg út, útskjóta spurningin um val av nýggjum nevndarlimi til komandi ársaðalfund.

### § 16

Nevndin heldur fundir, tá nevndarformaðurin metir tað vera neyðugt, ella tá ein av nevndarlimunum ella stjórin setur fram ynski um hetta.

### § 17

Fyri at avgerð kann verða tikin á nevndarfundi, krevst, at meirilutin av nevndarlimunum eru á fundi. Allar avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta. Um atkvøðugreiðslan stendur á jøvnum, er atkvøða nevndarformansins avgerandi.

### § 18

Felagið verður teknað við undirskrift nevndarformansins og einum stjóra í felag, ella við undirskrift av tveimum nevndarlimum í felag.

Nevndarfrágreiðing frá nevndarfundi verður gjørd og undirskrivað av øllum luttakarunum. Ein luttakari, ið ikki er samdur í avgerð nevndarinnar, hevur rætt til at fáa sína meining felda niður í nevndarfrágreiðingina.

Nevndin hevur heimild til at geva fulltrú.

### § 19

Á hvørjum ársaðalfundi verður grannskoðari valdur. Grannskoðarin skal vera løggildur.

§ 20

Roknskaparár felagsins er kalendaraárið.

§ 21

Grannskoðan av ársfrásøgn felagsins verður framd av tí á aðalfundinum valda grannskoðaranum.

§ 22

Soleiðis samtykt á ársaðalfundi felagsins í Sørvági tann 11. apríl 2016.

Birita S. Samuelsen, fundarstjóri